# smótinum

metir prísin á bretskum gassi fara at vera umleið 35 dollarar svarandi til tunnu av olju frá 2010 til 2015, tá flestu av gasskeldunum vestan fyri Hetland eru farnar at framleiða gass.

- Okkara metingar siga, at Laggan er lønandi á einum slíkum prísstøði segði Gillies, hóast tað er marginalt, um tað ikki eydnast at býta kostnaðin av infrastrukturi við aðrar verkætlanir.

**Stjórnin má lækka skatt**

Men tað er ógreitt, um smærri keldur vestan fyri Hetland eru lønandi, sjálvt við hægri prísum, fáa útbyggingar av hesum ikki nakað av stuðuli frá stjórnini. - Stjórnin má umhugsa av nýggjum, um hon hevur tann rætta skattapolitikkin segði Tholen frá UKOOA á oljuráðstevnuni. Og hesum var Mendelson frá Total ikki ósamdur við honum í. –Eg haldi, at skattafyrimunir eiga at vera partur av loysnini segði hann. Hann sá fegin, at stjórnin hevur ein leiklut í ætlanini at menna ein infrastruktur í økinum við at lata skattalætta í sambandi við tær stóru íløgurnar, sum standa fyri framman.

– Stjórnin má gera íløgu í hesa verkætlan við at lætta um skattliga. Feløg, sum framleiða olju og gass frá nýggjum keldum á bretska landgrunninum, rinda 50% í skatti sammett við ein standard partafelagsskatt uppá 28%. Nógv bendir á, at tað er rætt at lækka skattin, segði Tholen, um tað so verður avgerandi faktorurin fyri, um økið skal útbyggjast ella ikki. At fáa 40% av nógvum pengum er betri enn at fáa 50% av ongum legði hann aftrat. Darling frá orkumálaráðnum segði: - Vit eru sera upptiknir av hesi sannroynd, nú meðan vit staðfesta, at Norðsjógvurin er fult troyttur. Tá vit fara inn í meira torfør øki sum tað vestan fyri Hetland, so mugu vit vera vís í, at skattaskipanin er tann rætta. Vit eru tilreiðar at seta okkum niður og arbeiða saman við ídnaðinum fyri at tryggja, at vit hava ta røttu skipanina fyri at fáa sum mest upp úr Norðsjónum.

DTI talsmaðurin Richard Shrubb segði, at tað er ov tíðliga at siga nakað um, antin ein skattalætti fer at vera partur av útbyggingarætlanini fyri økið vestan fyri Hetland ella ikki. Tað stigið, sum er tikið til eina útbygging, kann vera lykilin, sum letur upp fyri longu funnum keldum í økinum segði Mandelson. –Um vit hava ein infrastruktur í økinum, so fer hann at skunda undir enn meira leiting. Og um smærri fund verða gjørd, so merkir tað, at tað longu finst ein leið at flyta gassið á marknaðin. –Har er framvegis nógv av olju og gassi har úti segði Darling.

*Keldur: Dow Jone, skotskar og bretskar heimasíður og bløð.*



*Transocean Rather boripallur borar tríggjar brunnar í løtuni, sum kunnu fáa týdning fyri framtíðar menningina á øllum Atlantsmótinum*

# Gongdin eystan fyri markið týdning fyri føroyska oljumenning

ANALYSA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Síðani føroyingar fóru at vísa møguligari olju og gassi í undirgrundini áhuga og ans hevur útviklingurin í londunum rundan um okkum skundað undir ynski og royndir okkara at finna olju og gass í føroysku undirgrundini.

Hóast Norðsjógvurin ikki er so langt vekk, so vóru tað kortini stóru oljufundini beint hinumegin markið, Foinaven og Schiehallion, sum fingu nakkahárini at reisast hjá føroyingum. Hví ikki eisini hjá okkum, tá olja og gass er so nær í grannalagnum, varð spurt. Og vit kenna øll oljusøguna, har fyrst yvirtøkan av ráevnunum skundaði undir marknasamráðingarnar við bretar, sum síðani skundaði undir lóggávuarbeiðið, ið so aftur varð grundarlagið undir kanningum og loksins leiting.

Og soleiðis fer søgan helst at halda fram nakað væl aftrat, nevniliga at vit neyvt fara at fylgja tilgongdini hinumegin markið og alla tíðina ímynda okkum, hvønn týdning framstig, tað verið seg leiting og útbygging har kunnu hava fyri okkum sjálvi. Og tað er í hesum anda, at greinin niðanfyri skal lesast. Nevniliga í hvønn mun útbygging av infrastrukturi vestan fyri Hetland við gassleiðingum og gassframleiðslustøðum kann fáa fyri okkara egnu olju- og gassframtíð. Tí hendir tað, at nógv gass verður funnið á føroyska landgrunninum, so er stóri spurningurin, hvussu vit fáa gassið á marknaðin. Og her er tað, at ein komandi infrastrukturur á bretskum øki kann koma føroyskum gassfeltum væl við. Tí eiga vit í Føroyum at fylgja gongdini hinumegin markið við stórum áhuga. Og her koma spennandi ætlaninar hjá bretsku stjórnini og oljufeløgunum at menna eitt infrakervið til m.a. flutning av gassi sum ein møgulig hjálpandi hond til eina framtíðar føroyska gassvinnu.

Tað er greitt, at kunnu bretska stjórnin og oljufeløgini, sum arbeiða á Atlantsmótinum, semjast um at fara undir at byggja upp ein infratstruktur í økinum, sum skal rudda slóð fyri útbygging av fleiri smærri gassfundum, so er hetta eisini nakað, sum kann gerast týðandi partur av eini framtíðar føroyskari oljuvinnu, har vit, sum liggja nógv meira avsíðis og fjarskotin, kunnu knýta føroysk gassframleiðandi felt í eina bretska flutningsskipan og síðani víðari á marknaðin.

Men alt hetta stendur og fellur við framtíðar gassprísinum og í hvønn mun bretska stjórnin vil geva feløgunum, sum vilja fara undir at útbyggja smærri gassfeltini, skattafyrimunir. Tíðindini úr Ukraina um, at hol er komin á eina gassleiðing úr Ruslandi, haðani ein stórur partur av gassbrúkinum í Europa verður nøktaður, siga okkum eisini so mikið sum, at bretska stjórnin heldur enn fegin sær, at gassgoymslurnar á Atlantsmótinum verða troyttar.